


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Sjálvstýrisflokkurin raðfestir almannamál høgt



Val
KÁRI PETERSEN
Sjálvstýrisflokkurin

*Skeiv mynd var í blaðnum fríggjadagin. Tí prenta vit hesa valgrein umaftur.*

Politikkurin hjá landsstýrinum hevur ongan samanhang við, hvar á almannaøkinum tørvurin er størstur. Heldur er hann merktur av, hvørjir bólkar eru best skipaðir og rópa harðast. Sjálvstýrisflokkurin fer heldur at gera ábøtur, har tørvurin er størstur. Sjálvstýrisflokkurin leggur serliga dent á barnafamiljur, stakar mammur, røktarpláss til eldri og vardar bústaðir til sinnisveik.

**Røktarpláss**

Tørvurin á røktarplássum er framvegis yvir 100. Nógv dømi eru um, at fólk framvegis liggja hjálparleys heima í songini, og bert sleppa upp í løtum, tá heimahjálpin tekur tey upp at sita. Avvarðandi eru ofta í dýrastu neyð og sálarliga niðurbrotin, tí tey ikki klára og orka at taka sær av sínum egnu, tí tey eru røktarsjúklingar við sjúkum, sum tey avvarðandi ikki hava fortreytir fyri at taka sær av.

Sjálvstýrisflokkurin fer at leggja dent á, at gera nakað, har tørvurin er størstur, nevniliga útvega fleiri røktarpláss og serliga í Suðurstreymoy, har tørvurin er størstur.

**Barnafamiljurnar**

Norskar kanningar vísa, at kostnaðurin av einum barni er 4000-4500 um mð. Verður barnafrádrátturin á 700 kr. um mð. frádrigin, so er nettokostnaðurin av einum barni um 3500 kr. Serliga fleirbarnafamiljur fáa tískil sera torført við at fáa endarnar at røkka saman, og sosialir myndugleikar í Føroyum síggja nógvar av hesum familjum sum klientar. Sjálvstýrisflokkurin mælir tí til at hækka barnafrádráttin. Ein hækking uppá umleið 300 kr. um mð., fyri hvørt barnið er bæði ráðilig og realistisk at klára í einum valskeiði. Harvið fær ein fýrabarnafamilja 1200 kr meir at ráða yvir um mánaðin, te. 14-15.000 tús. um árið.

**Stakar mammur**

Tað er lýst í fleiri kanningum, at stakar mammur hava so trong fíggjarlig kor, at tað ikki ber til at liva í Føroyum uttan stuðul frá familjuni. Nógvar stakar mammur flyta tí til Danmarkar. Landstýrið hevur onki gjørt við henda trupulleika í farna valskeiði.

Sjálvur havi eg kannað, hvussu umstøður og skipanir eru í øðrum londum, og haldi serliga, at Noreg er ein fyrimynd í skipanum fyri familjur og stakar mammur.

Fyri at tryggja støkum mammum livilig kor, skulu trý mál fáast í rættlag.

Í fyrsta lagi er neyðugt, at pápar gjalda ein størri part av kostnaðinum av barninum. Sum nevnt vísa norskar kanningar, at matur, klæði og tak yvir høvdi til eitt barn kostar 4000-4500 kr um mánaðin.

Eru fleiri børn, so kosta næstu børnini minni.

Í Noreg verður barnapeninguurin roknaður við støði í kostnaðinum, og foreldrini gjalda við jøvnum býti, um inntøka teirra er umleið tann sama.

Í Føroyum verður kostnaðurin av einum barni goldin soleiðis:

| | |
|---|---|
| Mamman | 2550 kr. |
| Tað almenna | 1175 kr. |
| Pápin | 475 kr. |
| Tilsamans | 4200 kr. |

Land og kommunur gjalda barnafrádrátt á 700 kr. Landskassin endurrindar harumframt helvtina av pápagjaldinum á 950, te. 475 kr.

Pápar gjalda 950 kr, men fáa helvtina endurrindaða frá landskassanum.

Roknað av nettokostnaðinum hjá foreldrunum 3025 kr, rindar mamman 2550 kr (86 %) meðan pápin bert rindar 475 kr (16 %).

Samanborið við onnur lond gjalda føroysku stakmammurnar óforsvarliga nógv, meðan páparnir gjalda láturliga lítið.

Verandi skipan heldur støkum mammum niðri í fátækradømi, tí býti av útreiðslunum er so skeivt. Mamman rindar um 2500 kr. (84 %) og pápin rindar slakar 500 kr. (16 %). Persónliga haldi eg, at einki er meira náttúrligt enn báðir partar býta útreiðslurnar javnt. Um pápin og mamman býta útreiðslurnar javnt, so gjalda tey 1500 í part fyri hvørt barnið. Barnapeningurin, sum pápin skal gjalda fer tí uppá 1500.

Sostatt hevur staka mamman 1000 kr. meira eftir um mánaðin fyri eitt barn. (Eru fleiri børn er kostnaðarendurgjaldið nakað minni fyri næstu børnini.)

Tað skal viðmerkjast, at føroyskir politikarar vita, hvussu torfør støðan er hjá støkum mammum, men hvørja ferð eitt uppskot er um, at pápar skulu gjalda meira, so koyrir útvarpið og ymsir tingmenn hets móti almannaráðharranum. Bólkurin, ið skal gjalda hægri barnapening er ein sterkur bólkur stjórar, politikarar og útvarpsmenn, blaðmenn, sum ikki tíma at gjalda meira enn 475 kr. Aftaná massivt politiskt trýst eru øll uppskot um hækking av gjaldi pápans afturtikin úr tinginum.

Tað lága pápagjaldið og høga mammugjaldið hevur drastiskar avleiðingar. Tað, at mamman rindar 2500 kr. og pápin 500 kr fyri barnið um mánaðin, merkir at eftir 18 ár hevur mamman goldið 640 tús fyri barnið, meðan pápin bert hevur goldið 108 tús. Sostatt leggur lógin um barnapening milliónabyrðar á mammurnar, við at sleppa pápunum undan at gjalda.

Verandi skipan heldur støku mammunum niðri í fátækradømi. Í fyrsta lagi hava tær torført við at klára eina útbúgving, so leingi tær skulu ansa smáum børnum. Tískil hava tær ofta lítla inntøku til tær stóru útreiðslurnar av at hava eitt ella tvey børn. Harvið fáa tær ongantíð ráð at keypa fasta ogn, og koma ongantíð at fáa ágóðan av at fáa rentustuðul og kapitalvinning uppá føstu ognina. Staka mamman verður hildin niðri í eini fátækrafellu.

Persónliga haldi eg, at viðferðin, ið stakar mammur fáa frá føroyskum politikarum er út um alt mark vanvirðislig. Við sínum politikki dømir landsstýrið allar stakmammufamiljur til eitt lív í fátækradømi og nógv dømi eru um, at hetta hevur stórar skaðavirkningar tey børnini, sum vaksa upp í beinleiðis fátæksligum umstøðum. Eitt er at tey bert hava eitt foreldur at vegleiða og uppala seg, men landsstýrið tvingar tey eisini at liva eitt lív í fátækradømi.

Pápagjaldið í Føroyum er tikið úr tómari luft, tað hevur einki við kostnaðin av barninum at gera.

Páparnir gjalda so lítið, at tað svarar til tað, ið onnur gjalda fyri eina fjaradoptión av einum barni í Afrika. Tað er tankavekjandi, at landsstýrið ikki metir skyldurnar hjá einum pápa mótvegis barni sínum hægri enn tær, sum ein átekur sær við at gerast fjaradoptantur av einum barni í Afrika.

Tað einasta sakliga fyrilitið er at hyggja eftir, hvat ein barn kostar, og býta kostnaðin í helvt millum mammuna og pápan. Hetta gevur mammunum 1000 kr. meir um mánaðin enn tær fáa nú.

Tað er bert ein flokkur, sum hevur kannað umstøðurnar hjá støku mammunum og veruliga hevur viljan til at gera umstøðurnar hjá støku mammunum betri, nevniliga sjálvstýrisflokkurin.

**Bíligari bústaðir**

Í øðrum lagi mugu bíligari bústaðir fáast til vega. Neyðugt er helst at gera hetta í tveimum. Føroyska íbúðarmynstrið, har bert vera bygd sethús og raðhús, ið kosta 2-3 milliónir, kosta ov nógv. Lánsgjaldið verður ov høgt fyri bert eina inntøku í einum húsi, sum bert hevur eina inntøku. Tað almenna skal gjøgnum húsalánsgrunnin skipa fyri, at nógvar minni íbúðareindir vera bygdar, helst sum íbúðir. Bert á hendan hátt ber til hjá støkum mammum at fáa egið tak yvir høvdið, við rentum og avdrátti, men eisini við rentstuðli og virðisvøkstri á íbúðini.

Kortini vera nakrar eftir, ið hava annaðhvørt lága inntøku ella fleiri børn, og sum mugu stuðlast á annan hátt. Fleiri loysnir hava longu verið frammi politiskt. Sjálvstýrisflokkurin fer at arbeiða fyri loysnum, sum veita støkum mammum við lágari inntøku og/ella við fleiri børnum rætt til serliga bíligar bústaðir.

**Hækking av vanliga barnafrádráttinum**

Sjálvstýrisflokkurin fer í komandi valskeiði at arbeiða fyri at hækka vanliga barnafrádráttin um 300 kr. um mð. fyri barnið. Henda hækking kemur sjálvandi eisini støku mammunum til góðar.

Samlaði batin 16.000 pr. barn um árið.

Verður hækkingin av barnapeninginum samanlagdur við hækkingini av vanliga barnafrádráttinum er samlaði batin hjá støku mammuni 1300 kr. pr. barn. um mð. ella 16.000 pr. barn um árið.

**Vardar íbúðir til sinnisveik**

Stórur tørvur hevur leingi verið á vardum íbúðum til sinnisveik. Nøkur fólk eru veik viðhvørt og mugu tí leggjast inn til viðgerðar. Men inn ímillum eru lang tíðarskeið, har tey hava tað gott, og har tey kunnu búð í vardum bústaði. Á vardum bústøðum eru starvsfólk, sum kunnu fylgja við hvussu tey hava tað, og sum kunnu fáa tey innløgd tá tey hava tað minni gott.

Tað er ein skammblettur á okkara vælferðarsamfelag, at sinnisveik eru noydd at vera verandi á sjúkrahúsi, aftaná tey eru vorðin rímiliga røsk aftur.

Sjálvstýrisflokkurin og serliga eg persónliga fara at arbeiða fyri, at øll, sum klára at skapa eina rímiliga tilveru uttan fyri sjúkrahúsumhvørvi, fáa møguleika fyri at búgva í vardum bústaði.

Sum heild hevur sjálvstýrisflokkurin eina væl skipaða ætlan fyri hvat eigur at vera gjørt á almannaøkinum. Tí er bert ein flokkur at velja tann 19. januar: Sjálvstýrisflokkurin.

## Fokus á ættleiðing



Val
HEÐIN D. POULSEN
Sjálvstýrisflokkurin

Ein partur av ættleiðing er, at tann fíggjarliga byrðan, ið kann gerast so tung at lyfta fyri summi, at tey ikki klára at ættleiða. Tey síðstu árini er fíggjarliga byrðan økt munandi, og kann ein ættleiðing hava við sær útreiðslur fyri upp til kr. 200.000,-

Eingin skal halda, at tað er barnið, sum verður ættleitt, ið kostar. Útreiðslurnar stava frá umsiting, læknakanningum, ferðing og so framvegis.

Í Føroyum kunnu foreldur fáa kr. 50.000,- í stuðul til ættleiðing.

**Væntandi politiskur vilji?**

50.000 kr. er ikki nógv í dag, tá foreldur skulu rinda fleiri ferðir so nógv fyri at gjøgnumføra eina ættleiðing.

Fyri landskassan er hetta ikki nakar tyngjandi postur, tað mesta landskassin hevur latið var í 2005, tá lat landskassin kr. 550.000,-. Ein sera lítil byrða hjá landskassanum, samanborið við tann ómetaliga stóra týdning ættleiðing hevur fyri foreldur og samfelag.

Ættleiðingarfelagið royndi í heyst at fáa landsstýrismannin í Almanna og Heilsumálum, Hans Paula Strøm, at leggja fram lógaruppskot um at hækka stuðulin til ættleiðing. Einki bleiv lagt fram av Hans Paula Strøm, og hevur hann ikki givið sína meining til kennar alment.

**Tey við teimum lágu inntøkunum**

Verður játtanin ikki hækkað, kann tað henda, at tey sum eru veikast fyri fíggjarliga í samfelagnum, og ikki kunnu útvega sær fíggjarligan stuðul, ikki fáa møguleikan at ættleiða.

Summi fólk velja ættleiðing framum, fyri onnur er ættleiðing einasti møguleiki at gerast foreldur. Verður hesin møguleikin tikin frá teimum, tí tey ikki eru nóg væl fyri fíggjarliga, er vandi á ferð fyri tí sum Løgmaður ávaraði um í nýggjársrøðuni, at ein nýggj samfelagsstatt verður sett til síðis, ikki einans fíggjarliga, men sum eisini vegna fíggjarlig kor eru dømd at liva uttan børn.

Hetta hevur tað góða vælferðarsamfelagið ikki ráð til.

**Meira um hetta á www.hedindp.com**